*Desember 2000*

*Lærugreinakunngerð*
*(felags fyri vinnuskúlarnar)*

# Føroyskt A

*Endamálið*

Endamálið er,
- at næmingurin mennir hugin at lesa og uppliva ein tekst
- at næmingurin mennir sítt málsliga, samfelagsliga og listarliga medvit, sína sjálvsfatan, sítt hugflog og síni evni at taka støðu
- at næmingurin dugir at greina, tulka og meta um ein tekst
- at næmingurin mennir medvitið um søgu, samfelags- og mentanarviðurskifti
- at næmingurin mennir sína málkenslu, bæði munnliga og skrivliga, so hann verður førur fyri at orða seg greitt og hóskandi til høvið.

*Undirvísingin*

**2.1** Føroyskt mál og føroyskur tekstur er støði undir undirvísingini.

**2.2** Við tekst skilst víðkaða teksthugtakið, t. e. at alt lisið, hoyrt og sæð er at skilja sum tekstur. Har til ber, velja lærari og næmingar tekstirnar í felag. Tekstirnir skulu vera fjølbroyttir í tíð, sniði og innihaldi. Bæði fagrar bókmentir og yrkisbókmentir skulu vera umboðaðar.
Høvuðsdentur verður lagdur á tekstalestur, ið sameinir uppliving, greining og tulking við atliti at málsligum, sálarfrøðiligum, samfelagsligum/søguligum og listarligum sjónarmiðum. At náa hesum verða hóskandi háttaløg og hugtøk nýtt. Til tess at seta tekst t.d. í bókmentaligt og samfelagsligt/søguligt høpi verða stuðulstekstir lisnir, t.d. søga, siðsøga og listsøga.
Málslig viðurskifti skulu takast við í viðgerðina, so næmingurin gerst varur við málsligt fjølbroytni: at ymiskur málburður verður nýttur til ymisk høvi, at mál kann vera tíðar-, staðar-, evnis- og persónsmerkt, v.ø.o. at innihald og orðing er ein heild.
Við at lesa og við munnligari og skrivligari framløgu skal næmingurin menna evnini at uppliva, skilja og meta um ein tekst.

**2.3** Í *munnligum* skal næmingurin royna ymsar samskiftishættir, t.d.: upplestur, samandrátt, samrøðu, orðaskifti, framløgu, pallborð, fyrilestur og leik.

**2.4** Í *skrivligum* skal næmingurin skriva ymisk tekstasløg, bæði bundin, t.d. vanligar stílar, har spurningar verða settir til tekst, skriva handilsbrøv, umsókn, og frí, t.d. skriva fagrar bókmentir og evna til fjølmiðlatekstir.

**2.5** *Málkunnleiki*
Umframt at mál er ein natúrligur partur í munnligum og skrivligum, er mál eisini ein sjálvstøðugur táttur í skrivliga arbeiðinum. Til at fáa málburð og rættskriving í trygga legu verður arbeitt við framburði, stíleyðkenni, setningsskipan, mállæru og rættskriving. Næmingurin skal fáa kunnleika um føroyska málsøgu, og í hesum sambandi skulu norrønir, íslendskir og nýnorskir tekstir lesast. Næmingurin skal fáa innlit í málrøkt, so hann verður førur fyri at meta um málrøktarspurningar.
Tekstir á fremmandamáli, serliga norðurlendskum, kunnu lesast, er tørvur á teimum at lýsa eitt evni gjøllari.

**2.6** *Fjølsamskifti*
Yvirlit verður givið yvir søguna hjá fjølmiðlunum i Føroyum. Næmingurin skal greina og meta um ymsar samskiftishættir, heruppií mynda- og próvførslugreining og gerast medvitandi um, hvussu fjølmiðlar kunnu ávirka okkum.

**2.7** *Myndir*
Næmingurin skal læra háttaløg og hugtøk í myndagreining og at greina og meta um myndir.

**2.8** *Filmslist*
Næmingurin skal læra háttaløg og hugtøk í filmsgreining og at greina og meta um filmar.

**2.9** *Kunningartøkni* er partur av undirvísingini.

**2.10** *Tvørfakligir* tættir verða tiknir upp, har høvi býðst.

*Innihaldið í undirvísingini*

*Munnligi tátturin*

**3.1** Lesast skulu uml. 300 normalsíður umframt høvuðsverk[1]. Mynd sum er lisin í flokkinum telur 1 normalsíðu. Hvør undirvísingartími, sum burturav verður brúktur til films, mynd- ella ljóðbandaundirvísing kann umroknast til 5 normalsíður.

**3.2** *Høvuðsverk*
Í minsta lagi 4 høvuðsverk verða lisin. Tvey verk kunnu vera týðingar. Verkini skulu umboða ymisk bókmentarák og meira enn eitt tekstaslag. Eitt av verkunum kann vera filmur ella myndaverk. Eitt høvuðsverk skal vera frá seinastu 20 árunum.

[1] Eitt høvuðsverk er ein skaldsøga, eitt stuttsøgusavn, yrkingasavn, sjónleikur, filmur ella myndaverk. Eitt verk kann eisini vera eitt tekstasavn við tekstum eftir sama rithøvund, tekstasavn frá ávísum tíðarskeiði ella tekstasavn við sama evni og sama ella ymiskum tekstasløgum, eisini yrkisbókmentum. Eitt verk, samansett av ymiskum tekstum, skal í minsta lagi vera 80 normalsíður. Verk, sett saman av yrkingum, skal í minsta lagi vera 25 normalsíður

**3.3** *Tekstir fyri 1920*
Lisnar verða í minsta lagi 50 normalsíður
Næmingarnir skulu kenna høvuðseyðkennini fyri skaldskap av mannamunni, og kvæði, sagnir og ævintýr verða lisin. Tekstir frá tjóðskapartíðini skulu vera umboðaðir.

**3.4** *Fjølsamskifti*
Lesast skulu í minsta lagi 80 normalsíður, heruppií 10 tíðindamyndir/sølulýsingar.

**3.5** *Myndir*
Í minsta lagi 5 myndir skulu gjøgnumgangast.

**3.6** *Filmslist*
Í minsta lagi ein filmur verður viðgjørdur.

**3.7** *Frøðitekstur*
20 normalsíður av fakligum teksti, t.d. lógarteksti, brúkaravegleiðingum og tøknifrøðiligum teksti skulu lesast við atliti at bæði innihaldi og máli.

**3.8** *Málkunnleiki*
Í minsta lagi 50 normalsíður skulu lesast, norrønt, íslendskt og nýnorskt íroknað.

*Skrivligi tátturin*

4 *Uppgávur*
Næmingurin skal hvørt árið, umframt smærri uppgávur, harímillum 6 máluppgávur, skriva í minsta lagi 7 stílar.
Serliga seinna árið skulu stílarnir vera próvtøkulíknandi.

**5.1** *Støðisritgerðin*
Í HT2, 1.HIF og 1.HH skal næmingurin skriva eina ritgerð, ið er 6-8 síður.[2]
Evnið verður valt í samráð við læraran. Ritgerðin kann vera framhald av evni, ið er viðgjørt í flokkinum, men tekstur, ið er nýttur í undirvísingini, kann ikki nýtast sum høvuðsgrundarlag í ritgerðini.
Endamálið við ritgerðini er, at næmingurin skal læra
- at arbeiða sjálvstøðugt
- at finna fram tilfar
- at skipa tilfar
- at nýta keldur, heruppií at gera undirgreinar (notur)
- at fara í dýpdina við einum avmarkaðum evni og lata tað í hóskandi málbúna
- at halda seg innan fyri ásettar karmar viðvíkjandi uppgávuorðing, tíð og vavi.

**5.2** Ritgerðin verður latin næminginum aftur í seinasta lagi 5 vikur eftir, at hon er latin inn. Hvør næmingur skal hava skrivliga eftirmeting av ritgerðini.

**5.3** Dømingin verður grundað á eina heildarmeting av, hvussu uppgávan er skipað, viðgjørd og frágingin.

---
[2] Ein síða hevur vanliga 2000 tekn

**5.4** Ritgerðin telur sum 2 próvtøkulíknandi uppgávur.

*Høvuðsuppgávan*

**6.1** Um høvuðsuppgáva verður skrivað í útbúgvingini, skal næmingurin í hesi uppgávu seta seg inn í eitt sjálvvalt evni og sýna evni til sjálvstøðugt at bera øðrum tað innlit, hann hevur ognað sær.

**6.2** Uppgávuevnið og háttalagið skulu vera innan fyri karmarnar um lærugreinina, men evni og sjónarmið úr øðrum lærugreinum kunnu takast uppí. Evnið kann vera framhald av einum evni, sum er gjøgnumgingið í flokkinum, men tær nýttu bókmentirnar mugu ikki frammanundan hava verið brúktar í undirvísingini.

**6.3** Dømingin verður grundað á eina heildarmeting av, hvussu næmingurin hevur greitt frá týdningarmestu táttunum í valda evninum, og hvussu uppgávusvarið verður skipað, viðgjørt og lagt fram.

*Próvtøkan*

**7.1** Hildin verður ein munnlig og ein skrivlig próvtøka.
Skrivliga próvtøkan er 5 tímar

**7.2** *Stílur*
Næmingurin skal skriva eina av fleiri uppgávum. Hvør uppgáva hevur tekst sum grundarlag. Fagrar bókmentir í bundnum og óbundnum máli, yrkisbókmentir og mynd ella sølulýsing skulu vera umboðaðar. Tekstirnir skulu ikki vera longri enn uml. 15 normalsíður tilsamans. Til skrivligu próvtøkuna er eingin avmarking í nýtslu av hjálparmiðlum.
Dømt verður út frá eini heildarmeting, har dentur verður lagdur á málsligan førleika og evnini at leggja fløkt viðurskifti greitt fram. Eisini verður dentur lagdur á evnini at leggja fram vitan, hugsan og upplivingar, at taka støðu og grundgeva fyri síni støðutakan, og hvussu uppgávan er skipað.

**7.3** Givið verður eitt próvtal.

**8.1** *Munnliga próvtøkan*
Næmingar, ið fara upp eftir vanligum treytum, geva upp tvey høvuðsverk og umleið 150 normalsíður.

**8.2** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**8.3** Næmingurin skal upp í einum ólisnum teksti, sum hevur tilknýti til uppgivnu tekstirnar. Teksturin, ið kann vera samansettur av fleiri tekstum, skal vera í mesta lagi 8 normalsíður. Hvussu langur teksturin er, veldst eisini um tekstaslag og torleikastig. Ólisni teksturin skal greinast og tulkast; ein lisin tekstur verður brúktur til at seta avrikini í samanhang.

**8.4** Lærarin velur tekstin. Í honum skal standa rithøvundur (greinskrivari), útgávuár (útgávudagur), og hvaðani hann stavar. Er talan um brot úr teksti, skal stuttur samandráttur skrivast av heildini. Orðafrágreiðing verður givin, er tørvur á tí.

**8.5** Próvtøkuspurningarnir eins og uppgivin tekstur skulu vera fjølbroyttir og umboða tað, ið lisið er. Næmingurin fær próvtøkuspurningin skrivliga umframt reint, vælprentað eintak av ólisnu og lisnu tekstunum. Lærarin kann orða vegleiðandi spurningar til tekstirnar. Fyrireikingartíðin er umleið 60 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. Fyri próvtøkuna skal lærarin boða næminginum frá, hvørjir hjálparmiðlar eru í fyrireikingarhølinum.

**8.6** Næmingurin kann hava alt skrivligt tilfar við sær í fyrireikingarhølið, men inn til próvtøkuna hevur hann bert loyvi at hava við próvtøkutekst og uppskriftir gjørdar í fyrireikingartíðini.

**8.7** Próvtøkan varir uml. 30 minuttir, tá er próvdøming íroknað.
Næmingurin leggur fyri, og próvtøkan fer fram sum samrøða millum næming og lærara.

**8.8** Dømt verður út frá eini heildarmeting, har dentur verður lagdur á, at næmingurin dugir
- at finna fram til týdningarmestu tættirnar viðvíkjandi innihaldi og sniði
- at leggja fram sína vitan, hugsan, uppliving, støðutakan og grundgevingar greitt, sjálvstøðugt og væl skipað
- at fara út um tekstin og seta hann í størri samanhang.

**8.9** Givið verður 1 próvtal.